– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Hugnalig hús á Langasandi

**Hugnaligu húsini standa sera væl fyri á Skorpisoyrarvegi á Langasandi**









### Fyrsta fatanin
Tú sært við tað sama, at talan er um eini sera hugnalig eldri hús, sum kunna nýtast sum heilársbúðstað, men tey eru eisini sera væl egnað sum summarhús.

### Húsini
Húsini eru væl hildin, í góðum standi og eru sera hugnalig. Húsini hava nýggja tekju, nýggjan ketil og oljufýr. Sunnanfyri húsini er stórt nýtt bilhús.

### Ljós og luft
Húsini standa væl fyri mitt í bygdini niðri við sjóvarmálan. Hevur tú hug til sjógvin, er hetta júst rætta staðið fyri teg. Har er veðurgott, friðarligt, sera barnavinarligt, og tú hevur útsýni yvir alt Sundalagið.

### Stílur og snið – inni og úti
Stílurin er eitt bland av nýggjum og gomlum, men er tó lættur og ljósur. Urtagarður er niðanfyri húsini, so har er laga manni at sita við einum kaffimunni, og njóta frálíka útsýnið og sólina til langt út á kvøldið.

### Innan
Í miðhæddini er inngongd, gongd, køkur, kovi og stova. Í ovastu hædd eru 2 kømur. Í niðastu hædd er kjallararúm / fýrrúm, wc og baðirúm. Trappur er millum hæddirnar.

### Fakta
**Adressa:** ..........Skorpisoyrarvegur 4, Langasandur
**Byggiár:** ...........1930
**Hæddir:**............3
**Gólvvídd:**..........120 m²
**Grundøki:**.........430 m²
**Bilhús:**..............ja
**Prísuppskot:** ...kr. 600.000,00









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**